## Til Noregs at arbeiða

Eysturevropearar í hópatali velja at fara til Noregs at fáa sær arbeiði. Higartil í ár eru umleið 8.000 fólk úr teimum eysturevropeisku londunum komin til Noregs, og sjálvt nú í november koma ímillum 300 og 400 um vikuna, skrivar Aftenposten.

Sum er hava 25.000 eysturevropearar arbeiðsloyvi í Noregi, og tað ru 8.000 fleiri enn fyri einum ári síðani. Hagtølini vísa, at munandi fleiri eysturevropearar eru komnir til Noregs at arbeiða, síðani Estland, Letland, Litava, Póland, Kekkia, Slovakia, Ungarn og Slovenia fingu limaskap í ES tann 1. mai í ár. EBS-sáttmálin ímillum ES og Noreg gjørdi, at við limaskapinum bleiv tað lættari hjá fólki í teimum nýggju limalondunum at fáa arbeiðsloyvi í Noregi, tí sambært sáttmálanum er Noreg partur av felags arbeiðsmarknaðinum.

Tann eysturevropeiska arbeiðsmegin er ikki bíligari enn tann norska, tí sambært EBS-sáttmálanum skulu fremmandafólkini hava somu løn og somu arbeiðstíð sum teirra norsku starvsfelagar. Kortini er tað ein spurningur, hvussu nógv eysturevropeararnir hava eftir á bankabókini, tá skattur og annað er goldið. Millum annað hevur tað víst seg, at nógvir teirra gjalda meiri enn 3.000 krónur um mánaðin fyri eitt kamar við atgongd til wc og vaskirúm.

Sambært hagtølunum eru tað serliga pólendingar og litavar, sum koma til Noregs at arbeiða. Av teimum 25.000, sum hava fingið arbeiðsloyvi, eru 16.000 úr Pólandi og 6.000 úr Litava. Hagtølini vísa eisini, at næstan allir eysturevropeararnir fáa arbeiði. Sambært teirri seinastu uppgerðini eru tað bara umleið fýra prosent, sum einki arbeiði fáa.

## Nærkast húsagangi

Russisku myndugleikarnir hava noktað oljufelagnum Yukos at selja burtur av sínum partabrøvum, og tað kann hava við sær, at felagið fer á húsagang.

Leiðslan í Yukos ætlaði at selja 34,5 prosent av partabrøvunum fyri at útvega pengar til ta ovurstóru skattarokningina, sum felagið hevur fngið. Rokningin er góðar 100 milliardir krónur, og so nógvar pengar hevur felagið ikki. Leiðslan hevur tí kunngjørt, at verður skatarokningin ikki útsett, ella fær felagið ikki loyvi at selja partabrøv, fer tað á húsagang.

Høvuðseigarin í Yukos, Mikhail Khodorkovskij, hevur sitið í varðhaldi í meiri enn eitt ár, skuldsettur fyri umfatandi skattasdvik. Fleiri russiskir eygleiðarar vilja vera við, at í verulekanum er málið politiskt, tí Khodorkovskij fíggjaði valstríðið hjá andstøðuvalevnum á russiska forsetavalinum í fjør.

## Ringja til fánýtis

Nógvir danir hava ilt við at fáa samband við læknan, tá teir hava tørv á læknahjálp.

Ein kanning, sum læknarnir sjálvir hava gjørt, vísir, at 27 prosent av teimum, sum ringja til læknan í vanligari arbeiðstíð, ringja til fánýtis. Næstformaðurin í læknafelagnum, Yves Sales, sigur við blaðið Dagens Medicin, at kanningin staðfestir, at læknarnir megna ikki at liva upp til kravið um, at ein sjúklingur skal altíð fáa fatur á lækna í vanligari arbeiðstíð.

Yves Sales heldur, at máið er álvarssamt, tí tað kann skaða trúvirðið hjá læknunum og arbeiði teirra.

## Aftur í varðhald

Ísraelski kjarnorkuserfrøðingurin Mordechai Vanunu, sum varð latin leysur fyrr í ár eftir at hava sitið átjan ár í fongsli fyri at hava avdúkað ísraelsk kjarnorkuloyndarmál, er aftur settur í húsavarðhald.

Skyldfólk hansara siga, at hann bleiv tikin í Jerusalem hóskvøldið, og at hann skal sita sjey dagar húsavarðhaldi. Tá hann slapp úr fongslinum í vár, fylgdu fleiri treytir við, og sum skilst vilja myndugleikarnir vera við, at hann hevur ikki hildið treytirnar.

Vanunu hevur sagt, at hann vil fegin sleppa at flyta úr Ísrael, men tað vilja myndugleikarnir ikki loyva honum. Teir siga, at hann er framvegis ein hóttan ímóti landsins trygd.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Rætti eftirmaðurin situr í fongsli



*Yasser Arafat varð jarðaður í Ramallah aftan á eitt bønar- og minningarhald í Kairo, har umboð úr nógvum londum vóru hjástødd*

**Fyribils hava teir gomlu vinmenninir hjá Yasser Arafat tikið við palestinsku leiðsluni. Tann, sum tykist hava bestu møguleikarnar seinni, situr í ísraelskum fongsli**

EFTIR ARAFAT
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Hóast Yasser Arafat er deyður, liggur skuggi hansara framvegis oman yvir palestinsku leiðsluni, tí eftirmenn hansara eru úr hansara gamla liði. Rawhi Fattouh, tjóðartingsformaður, hevur tikið við sum forseti, til val hevur verið, fyrrverandi forsætisráðharrin Mahmoud Abbas er nú formaður í PLO, og Farouk Kaddoumi er tilnevndur nýggjur leiðari í Fatah.

Vesturlendskir eygleiðarar í teimum palestinsku økjunum siga, at eingin av teimum trimum er serliga væl umtóktur ímillum palestinar. Teir flestu palestinararnir kenna als ikki nýggja forsetan, og Mahmoud Abbas er heldur ikki serliga væl lýddur, hóast hann hevur verið forsæt-isráðharri. Farouk Kaddoumi hevur tann veikleika, at hann býr als ikki í teimum palestinsku økjunum, men ferðast ímillum Sýrialand og Tunis. Ein annar veikleiki hjá honum er, at hann var ímóti friðarsamráðingunum í Oslo.

### Í fongsli

Tann maðurin, sum tykist hava bestu møguleikarnar at taka við sum nýggjur palestinskur leiðari, er Marwan Barghouti. Mong meta hann sum tað komandi ættarliðið í palestinsku leiðsluni, men trupulleiki hansara er, at hann situr í fongsli í Ísrael, tí hann hevur fingið fimm ferðir lívlanga fongsulsrevsing fyri sín leiklut í uppreistrinum.

Tað var ein sivilur ísraelskur dómstólur, sum dømdi Marwan Barghouti, og tað ger, at ísraelsku myndugleikarnir kunnu ikki lata hann leysan, uttan so at forsetin gevur honum grið. Var tað ein hernaðardómstólur, sum dømdi hann, kundu myndugleikarnir latið hann leysan sum lið í einum ella øðrum býti, skrivar Reuter. Men fyribils noyðist hann at bíða.

Vesturlendskir eygleiðarar ivast ikki í, at víðgongdir felagsskapir sum Hamas og Islamskt Jihad fara at bjóða »nýggju« leiðarunum í Ramallah av. Eitt nú ætlar Hamas at stilla upp á komandi valinum, og úrslitið fer at vísa, hvønn veg palestinar ætla sær, nú tann gamli leiðarin er deyður.



*Marwan Barghouti verður hildin at vera tann, sum kann savna palestinska fólkið. Trupulleikin er, at hann situr í fongsli í Ísrael*

SETHÚSAMARKNAÐURIN

## Sethús og handilshøli til sølu



Advokatskrivstovan

Vegna Føroya Skiftisrætt verður ognin J.C. Svabosgøta 4, 100 Tórshavn, við hesum lýst til sølu.

Talan er um eini sethús við útbygningi
Sethúsið er bygt í 1932, tað er í tveimum hæddum, hvør á umleið 50 m2, innrættað soleiðis:

Kjallari: Kjallararúm, lítið wc, og rúm ið hevur brúkt til handil
Miðhædd: Gangur, baðirúm, køkur, stova og eitt kamar

Tilbygningur í einari hædd á uml. 70 m2, er bygdur í 1965.
Tilbýgningurin er í tveimum, eitt handilshøli og eitt minni rúm
Tilbygningurin er útleigaður, og leigusáttmálin stendur við til 30.10.2005
Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av

*Nærri upplýsingar um ognina fáast frá:*

Advokatskrivstovuni
Fr. Petersensgøtu 9 · 110 Tórshavn · Tel. 311145
Att: Fríða Patursson, adv.
frp@jura.fo

til sølu



## Hús í Tórshavn

Sethúsaognin Dalavegur 22, 100 Tórshavn verður hervið lýst til sølu.

Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara. Samlaða gólvvíddin er umleið 192 $m^2$. Á loftinum eru 4 kømur, gongd, umframt baðirúm.
Í miðhæddini er køkur, 2 stovur, 1 kamar, baðirúm og gongd. Kjallarin er partvís innrættaður. Umframt kjallararúm eru í kjallaranum køkur, gongd, wc, og tvey rúm.

Grundøkið er 541 $m^2$.
Garður er rundan um ognina.

Húsini eru bygd í 1959.

Húsini standa væl fyri miðskeiðis í býnum, við góðum útsýni.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tel 311260 · Fax 311261
advokatfelagid@kallnet.fo

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

# Hús, hús, hús...

HESTPRENT · TEL. 314 555



# Finn dreymahúsið í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN